TIL ARBEIÐIS

**LAGT TIL RÆTTIS:** Vilmund Jacobsen



*- Eg eri nokso spontan og ikki bangin fyri at leypa út í uppgávur. Tað kann vera ein styrki at vera spontan, men tað kann eisni vera ein veikleiki, sigur Anna Kathrina Højgaard Mynd: Vilmund Jacobsen*

## FAKTA

**Navn:** Anna Kathrina Højgaard
**Starv:** Fotografur
**Besta við starvinum:** At arbeiða sum eg sjálv vil
**Ringasta við starvinum:** Mær dámar tað bara...

# Mær dámar skuggar og ljós

- EG BYRJAÐI AT TAKA MYNDIR SUM STÓR **SMÁGENTA**, OG TAÐ VAR PÁPI MÍN, SUM **EGGJAÐI** MÆR. HONUM DÁMDI SERA VÆL AT TAKA **MYNDIR** OG HEVÐI SJÁLVUR EITT YNSKI UM AT GERAST **FOTOGRAFUR**. HANN GJØRDIST Í STAÐIN **TRYGGINGARMAÐUR**. TAÐ VAR PÁPI, SUM SOLEIÐIS STUÐLAÐI MÆR Í AT FARA Í **LÆRU**. SUM UNG ÁTTI EG GOTT **MYNDATÓL**, OG TAÐ VAR IKKI SO SJÁLDAN, AT EG TÓK MYNDIR AV **FLOKSFELØGUM** – OG **VIÐHVØRT** FÓRU VIT ÚT Í NÁTTÚRUNA AT TAKA MODELMYNDIR, SIGUR **ANNA KATHRINA HØJGAARD**

Anna Kathrina Højgaard, ið mong kenna sum fotografur og listarkvinna í breiðari merking, er fødd á Reyni í Havn.

- Vit búðu beint yvir av Portugálinum, til eg var umleið seks ára gomul. Eg haldi meg minnast heilt aftur til 2-3 ára aldur. Vit gingu sum leysir fuglar kring um í hesum serstaka umhvørvi, spældu í fjøruni og balanseraðu út yvir vatnið, sum hon tekur til.

Sæð í bakspeglinum, heldur hon, at hetta var ikki heilt vandaleyst.

- Í dag eru børnini so væl vard í mun til okkum, sum vuksu upp, tá eg var barn, leggur hon aftrat.

Anna Kathrina minnist eisini, at hon sum eini fimm ára gomul saman við mongum øðrum plagdi at standa í kø og keypa mjólk í grannalagnum, og her møtti hon næstan allari Havnini, sum hon tekur til.

- Tað var ógvuliga litríkt, um eg so kann siga, at veksa upp í umhvørvinum á Reyni. Her vóru øll møgulig fólka, bæði fitt fólk og undarlig fólk. Andlitini á fleiri av hesum fólkum sita føst í minninum. Hetta var sum ein pragtfull ævintýraverð – júst sum í einum sirkus - bæði til gott og minni gott. Men eg hevði ikki viljað verið hesi ár og hesi upplivilsi á Reyni fyri uttan.

Tey næstu árini búði Anna Kathrina í eysturbýnum í Havn.

### Lærdi til fotograf

Eftir at hon hevði fingið realskúlaprógv í Havn í 1973, fór hon longu eftir summarfrítíðina sama heyst í læru sum fotografur hjá Bambus.

- Tað tók hálvt fimmta ár at læra til fotograf, og umleið helmingin av lærutíðini var eg í læru hjá ymiskum fotografum í Danmark. Hetta passaði væl hjá Bambusi, sum eisini skuldi røkja sítt skeiðvirksemi. Í Danmark var eg í læru hjá bæði portret-og reklamufotografum. Eg var í nakrar mánaðir hjá einum – og so aftur nakrar mánaðir hjá einum øðrum. Hetta var á Keypmannahavnar-leiðini, og júst um hetta mundið í sjeytiárunum hendi nógv innan eitt nú mótaheimin. So, hetta gjørdist ein ógvuliga spennandi og lærurík tíð. Einar tríggjar ferðir var eg í skúla í umleið hálvan triðja mánaða hvørja ferð. Skúlin var í Randers, og her skuldi eg læra um alt tað teoretiska. Ein fittur partur av skúlagongdini snúði seg um kemi og rokning, og tá varð sagt, at fotografskúlin var á hædd við eitt studentsprógv í so máta.

Anna Kathrina sigur, at tá hon fekk sítt prógv sum portret-og reklamufotografur, stóð Bamsu'sa navn á sveinabrævinum.

- Eg haldi, at tað var gott fyri mína útbúgving, at eg kom so víða, meðan eg var í læru. Tað hendi jú nógv meiri í Danmark enn í Føroyum um hetta mundið, og tí gjørdist mín sjónarringur kanska størri og meiri fjølbroyttur, enn um eg øll árini hevði starvast hjá Bambus.

Anna Kathrina Højgaard sigur, at tá hon kom heimaftur til Føroya sum útbúgvin fotografur, fekk hon ymiskar uppgávur at gera fyri føroysku bløðini og lýsingarstovur, og serliga samstarvaði hon nógv við Ingvør Nolsøe, sum tá hevði stovnað sína egnu lýsingarfyritøku.

- Eg haldi sjálv, at eg kom við einum nýggjum og minni traditiónsbundnum hátti at fotografera upp á, og hetta gjørdi, at áhugi var fyri mínum myndum og motivum. Hetta var ein ógvuliga spennandi tíð, og eg haldi, at mín háttur at fotografera líka sum var startskotið til ta nýhugsan innan fotografering, sum vit sóu árini eftir.

Anna Kathrina hevur ikki sovið tíðina burtur, síðan hon sum ung fekk sína útbúgving sum fotografur.

- Í nítiárunum búði eg í Danmark í eini 8-9 ár og kom heimaftur til Føroya í 2001. Meðan eg var í Danmark hesi árini, gekk eg á Svendborg Grafiske Værksted í eini tvey ár, og eitt skifti gekk eg eisini á Odense Tegne-og Malerskole. Haraftrat gekk eg tað mesta av einum ári á hondarbeiðsskúla í Norðurjútlandi. So, eg dugi ikki bara at fotografera, tekna og mála, men eg dugi eisini at seyma frakkar og kjólar, sigur hon brosandi.

Hon sigur, at hon hevur altíð havt eygu og oyru opin, har hon hevur verið.

- Eg eri nokso spontan og ikki bangin fyri at leypa út í uppgávur. Tað kann vera ein styrki at vera spontan, men tað kann eisini vera ein veikleiki, um tú ikki dugir at halda eitt sindur aftur, sigur hon.

### Í beiðum høpi

Gávurnar hjá listarkvinnuni, sum Anna Kathrina Højgaard so sanniliga er, spenna rættiliga víða.

- Eg byrjaði at taka myndir sum stór smágenta, og tað var pápi mín, Jóhan Højgaard, sum eggjaði mær. Honum dámdi sera væl at taka myndir og hevði sjálvur sum ungur eitt ynski um at gerast fotografur. Hann gjørdist í staðin tryggingarmaður. Tað var pápi mín, sum soleiðis stuðlaði mær í at fara í læru. Sum ung átti eg gott myndatól, og tað var ikki so sjáldan, at eg tók myndir av floksfeløgum mínum – og viðhvørt fóru vit út í náttúruna at taka modelmyndir. Sjálvur tók pápi so óføra góðar og skarpar myndir, leggur hon aftrat.

Í eini tvey ár, meðan hon gekk í realskúla, arbeiddi Anna Kathrina í Havnar Bio. Her gjørdist hon hugtikin av myndum og filmsupptøkum. Serliga var tað ein enskur filmur um ein kendan mótafotograf, sum hugtók hana.

Í dag arbeiðir Anna Kathrina Højgaard nógv við fotomyndum, og hon er ikki minst bitin av tí, hon rópar reflektiónum – eftir afturspeglingum.

- Mær dámar eisini óvuliga væl at kombinera við grafikki, og her plagi eg at gera tyngri arbeiði á verkstaðnum hjá Tórshavnar Kvøld-og Listaskúla, har amboðini eru til tað. Men hjá mær, eins og hjá mongum øðrum listarfólkum, er nógv knýtt at tíðarskeiðum, leggur hon aftrat.

Hon heldur, at tað grafiska líka sum er nær í familju við tað fotografiska, og fyri ein stóran part er líkheitstekin millum hesar greinarnar.

- Eg havi málað, síðan eg var eini 10 ára gomul, tá eg keypti mær fyrstu penslarnar. Langir steðgir hava verið í, men so knappliga vitjar hugurin aftur.

Anna Kathrina Højgaard hevði sína fyrstu stakframsýning við fotomyndum í 1983, og síðan tá hevur hon ikki tal á øllum teimum framsýningum hon hevur havt – og verið saman við øðrum um.

- Hvat eg ætli mær í framtíðini? Eg hugsi nógv um at geva út eina fotobók við svart/ hvítum myndum. Mær dámar væl skuggar og ljós – og at minimera litir. Myndir tiknar fram við landi, myndir av áum og hyljum – tað eri eg, sigur fotografurin og listarkvinnan, Anna Kathrina Højgaard.